STUDNI
Student Grant Fund

# Endalig fráboðan um barnsburðarfarloyvi

**Persónsupplýsingar** (Nýtið kúlupenn og spjaldrastavir)

| P-tal | Teldupostadressa | Telefon/fartelefon |
|---|---|---|
| _ _ _ _ _ _ - _ _ _ _ | | |
| Øll fornøvn | Eftirnavn | |
| Gøta / nr. | Postnr. | Býur/bygd |

**Útbúgvingartíðarskeið**

| Útbúgvingin byrjað | | Væntandi lokin |
|---|---|---|
| dag. mán. ár | - | dag. mán. ár |

**Útgjaldingarháttur**

Peningurin skal flytast á kontu ☐☐☐☐ - ☐☐☐☐☐☐☐
Skrásetingarnr. Kontunr.

**Barnsburðarfarloyvið var:**

| Farloyvi frá | | Farloyvi til | Lesturin byrjar aftur |
|---|---|---|---|
| dag. mán. ár | - | dag. mán. ár | dag. mán. ár |

Farloyvi fulla tíð ☐ farloyvi parttíð ☐ Um parttíð, útgreina, í hvønn mun farloyvið er hildið (tímar av fullari tíð) ____________________

**Viðmerkingar**

| |
|---|
| |
| |
| |

**Váttan frá skúla / lærustovni**

Undirskrift og stempul frá skúla / lærustovni

**Váttan**

Eg vátti undir trúnaðartreytum, at tær givnu upplýsingar eru rættar.

______________________________ ______________________________
Dagfesting Undirskrift umsøkjarans

*Sí vegleiðing á baksíðuni*

**Studni – Hoyvíksvegur 72 – Postsmoga 9 – FO - 110 Tórshavn**
**Heimasíða:** www.studni.fo - **T-postur:** studni@studni.fo

**Seinast broytt: 24.06.24**

# Vegleiðing viðvíkjandi barnsburðarfarloyvi til  lesandi

**Í stuttum kann sigast um skipanina:**
- studningur verður veittur í sambandi við barnsburð og ættleiðing.
- studningur verður í mesta lagi veittur í 11 mánaðir.
- studningurin er tann sami, sum tann lesandi vanliga fær.
- bæði foreldrini kunnu ikki samstundis fáa barnsburðarfarloyvisstudning.
- tann lesandi skal búgva saman við barninum fyri at fáa barnsburðarfarloyvisstudningin.

**Harafturat er ásett:**
- at studningurin vanliga verður veittur frá terminsdagfesting, men kann veitast kvinnum 1 mánað áðrenn og í serstøkum førum 2 mánaðir fyri termin.
- studningurin kann eisini veitast frá upp til 3 mánaðir eftir føðing.
- studningurin er óheftur av teimum rættindum, sum vunnin eru úr øðrum skipanum.
- rætturin til studningin kann verða varðveittur, um tann lesandi skiftir útbúgving í barnsburðarfarloyvistíðini treytað av, at tann lesandi er innskrivaður á eini útbúgving.
- um barnsburður ella ættleiðing fer fram áðrenn útbúgvingin byrjar, hevur tann lesandi rætt til at fáa barnburðarfarloyvisstudning tað tíðarskeiði, sum eftir er av teimum 11 ella 12 mánaðunum.
- um barn/fostur doyr, verður rætturin til barnsburðarfarloyvisstudningin til kvinnuna varðveittur, tá ið føðing er farin fram.
- **Gev gætur**, at lesandi missa rætting til barnsburðarfarloyvisstudningin, um tað er gingið longri enn 3 mánaðir eftir føðing, áðrenn farloyvið byrjar.

Barnsburðarfarloyvisskipanin gevur báðum foreldrum somu rættindi. Bæði tann lesandi móðirin og lesandi faðirin kunnu fara í farloyvi, treytað av, at tey ikki eru í barnsburðarfarloyvisskipanini samstundis. Við øðrum orðum fylgir barnsburðarfarloyvisstudningurin barninum uttan mun til, um tað er móðirin ella faðirin, ið velur at fara í farloyvi. Foreldrini avgera sjálv, hvussu tey býta farloyvið ímillum sín.

**Mannagongd**
Lesandi kunnu í dag fáa útbúgvingarstudning í upp til eitt ár út um ásettu lestrartíðina. Ein lesandi kann t.d. fáa stuðul í 5 ár til eina 4 ára langa útbúgving. Fær ella ættleiðir lesandi eitt barn í útbúgvingartíðini og tekur fult barnsburðarfarloyvi, gevur barnsburðarfarloyvisskipanin tí lesandi møguleika fyri at fáa útbúgvingarstuðul í upp til 6 ár til eina 4 ára langa útbúgving. Velur tann lesandi hinvegin t.d. at lesa hálva tíð í eitt ár,  er møguleiki at fáa stuðul í upp til 5½ ár til eina 4 ára langa útbúgving. Velur tann lesandi at taka barnsburðarfarloyvi í ½ ár, er eisini møguleiki at fáa stuðul í upp til 5½ ár til eina 4 ára langa útbúgving. Við øðrum orðum verður farloyvistíðin løgd afturat loyvdu stuðulstíðini.

Á skjalinum "Umsóknarblað til barnsburðarfarloyvi" skal tann lesandi saman við lærustovninum boða Studna frá, tá hann fer í barnsburðarfarloyvi. Lærustovnurin skal eisini  beinanvegin, tá tann lesandi byrjar aftur á lærustovninum, á skjalinum "Endalig fráboðan um barnsburðarfarloyvi", boða frá, at tann lesandi er byrjaður aftur á lærustovninum, og um burðarfarloyvið hevur verið fult ella partvís. Um farloyvi hevur verið partvís skal skúlin boða frá í hvønn mun tann lesandi hevur verið í farloyvi, teir mánaðirnar, viðkomandi hevur verið í farloyvi t.d. 17 av 34 tímum ella 12 av 30 tímum. Studni tekur síðani støðu til, hvussu nógvir mánaðir kunnu leggjast afturat stuðulstíðini hjá tí lesandi. Talan kann vera um 1-11 mánaðir.